




Puntur nr. 1




*Marknaðarstjórin á Atlantic Airways tykist ovurfegin um góðu undirtøkuna, sum rutan til Aalborg longu nú hevur fingið*

# Ein sentralur partur av Norðurjútlandi

**Á Atlantic Airways ivaðust tey ikki í valinum, tá ein eyka støð skuldi leggjast afturat Billund í flúgvingini til Jútlands**

FLOGFERÐSLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ikki færri enn 11 ferðir um vikuna flýgur Atlantic Airways í summar til Jútland. Rutan til Billund telur nú níggju fráferðir um vikuna, og hartil er flúgvingin til Aalborg nú víðkað, soleiðis at flogið verður tvær ferðir um vikuna til býin.

Aalborg flúgvingin varð eisini roynd í fjør, og marknaðarstjórin hjá flogfelagnum, Kent L. Christensen, sigur eisini, at talan var um eitt ógvuliga tilvitað val, sum tá varð gjørt.

– Fyrst og fremst, so hevur Aalborg eitt rættiliga stórt uppland av føroyingum, og tí var tað sera nærliggjandi, at rutunetið varð víðkað. Hartil, so høvdu vit tann positiva trupulleika, at kapasiteturin á Billund-rutuni var ov lítil, og tí var neyðugt við nýggjari rutu.

– Hugsar tú so eisini um ferðavinnuna, so liggur Aalborg sera væl fyri. Norðurjútland hevur hópin av frítíðarstøðum, sum føroyingar vanliga vitja, og í so máta er hendan rutan hampuliga uppløgd. Og hetta er eisini orsøkin til, at vit hava leygardag sum fastan flúgvidag til býin. Hetta er sonevndi skiftidagurin á flestu frítíðarstøðunum, og tí er tað best, um flúgvingin er í samsvar við hetta, sigur Kent.

– Hartil, so liggur eisini væl fyri, at keypa sonevndar flúgv/sigl pakkar, tá vit hava Aalborg sum støð. Teinurin upp til Hanstholm er ikki tann heilt stóri, og tí kunnu vit og Smyril Line í stóran mun supplera hvønn annan á hesum økinum.

**Væl móttikin**

Spurdur, hvussu móttøkan av nýggju rutuni hevur verið millum manna, er Kent skjótur at svara, at hon hevur verið framúr.

– Sjálvur hevði eg ikki ímyndað mær, at so nógv fólk longu nú gjørdu nýtslu av rutuni. Hetta er jú bara næsta árið, at flogið verður á rutuni, og tí er tað sera hugaligt at staðfesta, hvussu góð undirtøkan hevur verið.

Er hon somikið góð, at tit eisini umhugsa at flúgva fast upp á Aalborg um veturin?

– Tað er nokk dekan ov tíðliga at siga. Flúgvingin hjá okkum til Jútlands er ógvuliga nær tengd at ferðavinnuni. Um veturin hava vit bara tvær ferðir til Billund um vikuna, meðan hetta um summarið er níggju – umframt tær báðar ferðirnar til Aalborg. So í verandi løtu vil eg ikki siga, at talan verður um fasta flúgving. 9




